# gipspláta

plátu í hondunum heima á Føroyum. Men ein veit lítið um, hvat hetta veruliga er og hvussu tað verður gjørt, sigur Sigurd, sum var sera væl nøgdur við hesa vitjanina.

Møguleiki var eisini hjá teim vitjandi at seta fram spurningar, og tað nýtti Sigurd og aðrir eisini høvið til.

Her hevði ein fatur á monnum, sum vistu hvat tað snúði seg um. Og tí fingu føroysku gestirnir eitt frálíkt høvi til at seta seg inn í fyrimunirnar við nýtsluni av hesum danskt-framleiddu gipsplátunum.

### Broytt breidd

Fyri Sigurd hevði henda vitjanin eisini ein annan týdning.

Hetta var onnur ferðin hjá honum á verksmiðjuni, og tí fekk hann líkasum alt endurtikið eina ferð aftrat.

– Tað var gott at fáa alt hetta uppfrískað aftur. Nú kenni eg framleiðsluna munandi betri enn áður, sigur hann.

Hinvegin so kann Sigurd staðfesta, at framleiðslan er ikki so nógv broytt, síðani hann var her seinast.

Tað var kortini ein einstøk broyting, sum Sigurd beit merki í: Breiddin á plátunum.

### Lættar at handfara

Menningin innan byggivinnuna hevur eisini havt ávirkan á støddina av hesum plátunum.

Meðan ein hevur hildið meiri fast við longdina, so er breiddin á plátunum minkað rættiliga nógv.

Fyrr var breiddin á plátunum í stóran mun 120 cm., meðan tær nú eru smalkaðar niður í 90 cm.

Og hetta hevur eisini sína orsøk:

– Hetta er alt gjørt av ergonomiskum grundum. Pláturnar eru nú bæði lættari og betri at handfara.

– Í so máta er hetta ikki so øgiliga nógv nýtt, men er kortini til fyrimun fyri tann einstaka handverkaran, sigur Sigurd.

### Ein góð og ein ring

Á Tekniska skúla undirvísir Sigurd í tilfarslæru. Og út frá tí, hann sá og fekk upplýst á Danogips, kann hann taka hetta við í undirvísingina, m.a. tá talan er um gips.

Ofta koma plátur á marknaðin. Her kunnu tær keypast fyri ein bíligan pening tí tær eru uppá tilboð.

Men tað vísir seg ofta, at hesar bíligu pláturnar eru als ikki nóg góðar, tí tær ikki lúka øll trygdarkrøvini sum sett verða í dag.

– Eg kann her greiða teimum frá framleiðsluni og hvussu ein gipspláta verður gjørd og hvat er í henni.

– Og so kann eg jú eisini greiða teimum frá, hvat munurin er á eini góðari plátu og eini ringari plátu, sigur Sigurd.

**FAKTA**

**Brunatrygg loysn**

Brunateknisku eginleikarnir hjá gipsi eru ótrúligir.
Gips kann nevniliga ikki brenna og verður tí brúkt nógvastaðni til at verja annað byggitilfar, m.a. træ og stál.
Gipspláturnar innihalda bundin vatnmolekylir, sum verða frígivin, um eldur kemur í.
Við eini ógvusligari ávirkan frá hita útvikla hesi bundnu vatnmolekylini ein vatndamp. Hesi forða aftur útbreiðsluni av eldsloganum, sum var talan um eitt innbygt sprinklara-anlegg.

**FAKTA**

**Fleiri fyrimunir**

Í dag er ikki kravt, at sethús skulu hava gipsplátur tá talan er um brunatrygd.
Tá talan hinvegin er um stovnar – barnagarðar, skúlar og tílíkt – tá er alt gipsplátur.
Hetta er kortini eitt gott tilfar at byggja við. Tað er lætt at handfara og at arbeiða við.
– Skal ein tosa um fyrimunir og vansar við gipsplátum og øðrum byggiplátum, so eru fleiri pluss til gipspláturnar, siga teir kønu innan bygging.



*Teir kanna og fáa kunnleika um henda gipssteinin, sum kanska verður til eina byggiplátu í einumhvørjum føroyskum heimi*

# Pistólin lættir um arbeiðið



*Sámal Erik Hentze og Jens Kristjan Hansen við eitt av hentu tólunum í teirra arbeiði – eina pistól at skjóta seymir við*

**Ein lítil seympistól ger stóran mun hjá handverkarum í arbeiði teirra. – Hon er fantastiska hent, sigur handverksmeistarin, Sámal Erik Hentze**

BYGGERI 2006
*Snorri Brend*
*snorri@sosialurin.fo*

**Pistól:** Við ein av teimum 300 básunum á stóru framsýningini standa tveir mans.

Teir eygleiða og práta ófort saman um eitt av amboðunum, teir kenna nógv til og brúka javnan í teirra arbeiði.

Talan er um eina sonevnda pistól, sum teir brúka at skjóta seymir inn í veggin við.

– Jú, vit brúka hesa pistólina sera nógv, tá vit "pláta" í okkara arbeiði.

- Tann sum vit hava, er júst tann sama sum henda. So hesa kenna vit sera væl, sigur annar teirra, Sámal Erik Hentze.

Hin maðurin er Jens Kristjan Hansen, og saman eru teir stjórar í Húsavarðartænastuni í Havn.

### Fyrimunir

Fyri Sámal Erik er eingin ivi um, at arbeiðið hevði verið munandi tyngri uttan pistólir av slíkum slagi.

Tað er serliga mátin, sum henda pistólin skjýtur seymin inn í veggin uppá, sum er ein fyrimunur.

– Úrslitið er snøgt sagt, at seymurin situr í plátuni. Hann brýtur ikki frá sær, sum Sámal Erik tekur til.

Eitt er tað at henda pistólin lættir almikið um hjá Sámal Eriki og Jens Kristjan sum handverkarar.

Men tað eru eisini aðrir, sum hava gleði og gagn av fyrimununum við hesi pistólini.

So løgið tað enn kann ljóða, so eru tað málararnir!

### Hent amboð

Tað eru ofta teir, sum fáa stríðið aftaná um ein seymur ella skrúva ikki er komin nóg langt inn í sjálvan veggin, sum málararnir skulu mála aftaná.

– Teir siga, at teir eru beinleiðis imponeraðir av tí, sum henda pistólin ger, sigur hann.

Tá Sámal Erik hoyrdi um hesa pistólina av fyrstan tíð, avgjørdi hann beinanvegin at keypa sær eina til teirra arbeiði.

Og tað hevur hann ikki angrað:

– Fyri okkum sum brúkarar av henni, má eg bara siga, at hon er fantastiska hent, sigur hann.




*Maskinur í øllum støddum vóru at síggja á byggimessuni*